# Sosialurin

Nr 67 mikudagur • 10. apríl 2002 • 76. árgangur • Kr. 12,00



FÓLKIÐ FYRST


Sigfríður Olsen
Sandavágur


Katrin Jønsson
Nes


Kaj Boetius
Klaksvík

JAVNAÐARFLOKKURIN




Miðflokkurin:
**Bara kristindómur í Føroyum**

síða 3



Fimleikagentur:
**Flott avrik í Danmark**

síða 6



Jóannes Nielsen:
**Norðurlendska viðurkenning**

Baksíðan



# Suðuroyarferjan nú veruleiki

SKIPASMÍÐ

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Í gjáramorgunin skrivaðu umboð fyri spanska skipasmiðjusamtakið IZAR og landsstýrismaðurin í samferðslumálum Bjarni Djurholm undir sáttmála um bygging av nýggjari Suðuroyarferju. Hetta hendi á skipasmiðjuni í San Fernando í Suðurspaniu. Skipasmiðjan hevur smíðað skip seinastu 250 árini. Ferjan skal verða liðug í seinasta lagi 12. oktober 2004 og prísurin er 305 milliónir krónur.

- Eg eri væl nøgdur við, at tað aftaná drúgvar samráðingar er eydnast okkum at undirskriva sáttmála við IZAR. Serliga fegnist eg um, at suðuroyingar nú fáa eina ferju, ið er skræddaraseymað til farleiðina, og at tað ikki hevur verið neyðugt at skarva av projekteraðu ferjuni, sigur Bjarni Djurholm.

- Við støði í teimum upplýsingum, ið eg havi fingið um skipasmiðjuna í San Fernando, meti eg, at hon er væl før fyri at byggja ferjuna, so hon lýkur øll tey krøv, ið eru ásett í sáttmálanum og í tilhoyrandi byggispesifiktiónini. Strandfaraskip Landsins fer tó eisini at nýta ta neyðugu orkuna til byggieftirlit í San Fernando til tess at tryggja, at dygdin er í lagi. Strandfaraskip Landsins hevur higartil stýrt verkætlanini á ein sera kompetentan hátt, og eg eri sannførdur um, at henda stýring eisini heldur fram á fullgóðan hátt í byggitíðini, sigur Bjarni Djurholm


www.samband.fo

At standa saman, tað er gott


Bárður Nielsen
Valevni Sambandsfloksins í Norðstreymi

Saman - sterkari


Erikka Eltør
Valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum

Suðuroygging fyrst og fremst


Finnleif Guttesen
Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy

Sterkari vinnulív


Høgni Mikkelsen
Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi

www.kajleo.com


Kaj Leo Johannesen
*Eg vil berjast fyri einum rættvísum samfelagi!*
Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi